# Norðoya Sparikassi fingið áheitanir úr Sandavági

**Stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, váttar, at leiðslan hevur fingið fleiri áheitanir úr Sandavági um at lata eina deild upp har vesturi. Leiðslan á peningastovninum fer at hava fund um hetta sum skjótast**

PENINGASTOVNUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Norðoya Sparikassi hevur fingið fleiri áheitanir úr Sandavági um at lata eina deild upp har*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Boðini um at Føroya Sparikassi fer at lata deild sína aftur í Sandavági um hálvan februar, hava fingið fleiri privatpersónar at ringja til Norðoya Sparikassa við áheitanum á stovnin um at lata eina deild upp harvesturi. Eisini borgarstjórin í Sandavági hevur verið í sambandi við peningastovnin í Klaksvík. Hetta vátta bæði kommunuskrivarin í Sandavági, Albert Thomassen og stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg.

– Fleiri ringdu harvesturi frá mikudagin og spurdu seg fyri, og vit fara at taka hetta upp á leiðslufundi sum skjótast, sigur Eyðfinn, sum sostatt váttar, at tað ikki er heilt óhugsandi, at Norðoya Sparikassi kann lata eina deild upp í Sandavági.

Norðoya Sparikassi hevur fleiri smáar deildir – eitt nú á Viðareiði og í Leirvík. Og Eyðfinn samanber Sandavág við Leirvík, har munurin á fólkatalinum í bygdunum báðum er um 100 fólk.

– Vit hava royndir á hesum økinum, og vit vita eisini, hvat skal til fyri at fáa eina slíka deild at bera seg. Men tað er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt enn, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa.

**Eyst og vest**
Um nú tað skuldi verðið so, at Norðoya Sparikassi fer at lata eina deild upp vesturi í Sandavági, so viðgongur stjórin beinanvegin, at hetta er uttanfyri økið, sum stovnurin hevur í dag. Men hetta heldur hann ikki vera nakran stórvegis trupulleika. Serstakliga ikki, tá batanir á samferðslukervinum verða havdir í huga.

– Har er undirsjóvartunnil, og gongd er komin á Norðoyatunnilin, so um eini tvey ár, verður tað ikki meira enn ein tími til Sandavágs úr Klaksvík, og tað er ikki meira enn til Havnar, so tað dugi eg ikki at síggja sum nakran trupulleika, sigur hann.

Eisini vísir hann á, at bæði støðini eru í útjaðaranum í landinum við at høvuðsdeildin liggur í eystri, meðan ein møgulig deild í Sandavági kemur at liggja í vesturi.

**Bíligar deildir**
Hann greiðir frá, at tað er ymiskt, hvussu deildirnar hjá Norðoya Sparikassa verða koyrdar. Sum dømi kann nevnast, at deildin á Viðareiði er opin tríggjar dagar um vikuna frá klokkan 11 til 16 í leigaðum hølum. Útreiðslunar av deildini eru sostatt ikki so høgar, og tí ber hon seg. Eitt annað, sum eisini hevur nógv at siga er, at stovnurin hevur ein stóran part av viðskiftafólkunum á Viðareiði.

Eyðfinn ásannar tó, at gongdin er tann vegin, at færri deildir verða, men tað veldst eisini um, hvussu høgt tað verður miðað viðvíkjandi tænastustøðinum, heldur hann.

– Um ein stovnur skal hava tvey fólk í arbeiði og ein dýran bygning, ja, so sigur tað seg sjálvt, at tað verður ov dýrt at hava eina lítla deild, sigur hann. Norðoya Sparikassi hevur lagt seg eftir ikki at hava ov høgar útreiðslur av smáu deildunum, og letur tað til at eydnast væl hjá teimum, sambært Eyðfinni.

Um so hetta fer at enda við, at Norðoya Sparikassi fer at lata eina deild upp í Sandavági, ber ikki til at siga sum nú er. Men áheitanir eru komnar til stovnin, og at áhugin frá stovninum er tilstaðar, er hervið staðfest.

## Samstarv um skeið til føroyska vinnulívið

**Skeiðstovan Kvasir og ráðgevingarfyritøkan BST Århus hava gjørt eina samstarvsavtalu, sum fer at hava nýggjar møguleikar fyri føroyska vinnulívið við sær**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

BST er ein tann størsta ráðgevingarfyritøkan innan arbeiðsumhvørvið og trivnað í Danmark. Fyritøkan hevur nógvar royndir í at halda skeið innan danska vinnulívið.

Í fyrstu atløgu bjóðar Kvasir eina røð av skeiðum, sum verða hildin í Føroyum av BST Århus. Skeiðini varða millum ein og tríggjar dagar, og tey geva luttakarum millum annað møguleika til at fara aftur til sína fyritøku og arbeiða við:

*At minka um sjúkradagar*
*At bøta um arbeiðsumhvørvið á skrivstovum*
*At stýra teimum og sjálvstøðugum bólkum*
*At bøta um tað sálarliga arbeiðsumhvørvið*
*At føra starvsfelagasamrøður*
*At greina trivnaðin á arbeiðsplássinum*

Samstarvið hevur eisini við sær, at Kvasir við tíðini fer at kunna at yvirtaka konseptið og halda skeið í Føroyum.

Stjórin á BST Århus, Poul M. Schmidt, væntar, at samstarvið við Kvasir fer at verða ein fyrimunur fyri allar partar.

Hann sigur, at tey síggja eina munandi øking í áhuganum hjá donskum fyritøkum at menna og betra arbeiðsviðurskiftini hjá starvsfólkunum, og ivast hann ikki í, at tað er tað sama í Føroyum.

Meira fæst at vita um hesi skeið við at ringja til stjóran Poul M. Schmidt, BST Århus tlf. 87331100 ella til Sam Jakobsen á Kvasir tlf. 320204.

## Smáu sparikassarnir gera eingi stór spariátøk

**Norðoya Sparikassi savnar alt sítt virksemi í Klaksvík á høvuðsdeildini og hevur seinastu árini tillagað starvsfólkatalið við natúrligari frágongd. Stjórin fyri Suðuroyar Sparikassa heldur, at tey hava hóskandi starvsfólkatal**

SPARINGAR
*Solby Eliasen/*
*Eyðun Klakstein*

Norðoya Sparikassi hevur eisini merkt sviðan av, at færri avgreiðslu verða gjørdar á deildum peningastovnsins, men stjórin í Norðoya Sparikassa sigur, at tey hava allatíðina tillagað seg broytingunum.

– Um vit ikki taka næmingarnar við, so er starvsfólkatalið hjá okkum minkað við yvir tíggju prosentum seinastu árini, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Somuleiðis hevur stovnurin gjørt aðrar tillagingar. Til dømis lótu tey deildina á Kósini í Klaksvík aftur fyri hálvum triðja ári síðani. Eisini hevur peningastovnurin selt bygningin, har deildin við Klaksvíksvegin heldur til. Deildin er framvegis har, og leigusáttmálin er fyri tíggju ár. Men

Eyðfinn sigur, at tað helst bert er ein spurningur um tíð, inntil tann deildin letur aftur.

– Vit vilja hava alt virksemið í Klaksvík á høvuðsdeildina, so við tíðini fer deildin á Klaksvíksvegnum eisini í søguna, sigur hann. Ongar ætlanir eru at siga fólki úr starvi í Norðoya Sparikassa, og væntar stjórin als ikki, at tað kemur at verða neyðugt, tí stovnurin hevur framt tillagingarnar so hvørt. Eitt nú hava tey ikki sett nýggj fólk, tá náttúrlig frágongd hevur verið.

**Hóskandi tal í Suðuroy**
Suðuroyar Sparikassi hevur umframt høvuðsdeildina í Vági, tvær minni deildir. Onnur er í Havn, og hin er í Porkeri. Sparikassin í Suðuroy hevur ongar æltanir um at niðurleggja nakra av deildunum.

– Vit hava ongar ætlanir um at siga fólki úr starvi ella at niðurleggja nakra deild, sigur Mikkjal Sørensen, stjóri í Suðuroyar Sparikassa.

T að eru 16 fulltíðarstørv í Suðuroyar Sparikassa, og tað eru ikki ov nógv, hóast fleiri og fleiri viðskiftafólk eru farin at nýta sjálvvirkandi skipanir seinastu árini.

Tosað hevur verið um, at smáu sparikassarnir kunnu seta nýggjar deildir á stovn í teimum økjum, har stóru peningastovnarnir niðurleggja deildir.

– Eg kann einki siga um hetta. Um Suðuroyar Sparikassi skal fáa sær nýggjar deildir, so er tað ikki nakað, sum bara verður gjørt. Tað skal kannast væl frammanundan, sigur Mikkjal Sørensen.



# Økt pendling ávirkar tørvin á tænastum á bygd

**Samfelagsgranskarin, Dennis Holm, sigur, at økta talið av pendlarum ella fjarferðum er við at máa grundarlagið undan tænastu útboðunum á føroysku bygdunum, serliga kring miðstaðarøkið. Hann greiðir frá, at fólk í Streymoynni og partvíst eisini í Eysturoynni og Vágum í vaksandi mun nýta tænasturnar í miðstaðarøkinum, har nógv teirra arbeiða. Tað kemur tí ikki óvart á hann, at Føroya Sparikassi letur aftur deildir í smærru bygdunum kring Havnina**

PENDLARAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Samfelagsgranskarin, Dennis Holm á Granskingardepilin fyri Økismenning, sigur, at økta talið av pendlarum er við at máa grundarlagið undan tænastu útboðnum á bygd*

Sovibýir verða teir vanliga nevndir í londunum uttanfyri Føroyar. Smærri býir, har borgarar nærum bert yvirnáttað, meðan stórur partur av tíðini verður nýttur uttanfyri heimbýin. Vanliga er talan um fólk, sum ferðast við bili, bussi ella toki til arbeiðis inn í tey størru økini

Í Danmark verða hesi fólk nevnd pendlarar og á føroyskum er heitið fjarferðar. At fólk búseta seg í útjaðaranum og hava starv í miðstaðarøkinum er eisini eitt vanligt fyribrigdi í Føroyum.

Kanningar vísa, at talið av fjarferðum í Føroyum er støðugt økjandi. Fyrr í vikuni vórðu 16 fólk í Føroya Sparikassa søgd úr starvi og stovnurin letur aftur fimm deildir á bygd. Samfelagsgranskarin, Dennis Holm, sigur at økta fjarferðingin til miðstaðarøkið kann verða ein av orsøkunum til, at Føroya Sparikassi hevur valt at taka hesi stig - í øllum førum tá hugsað verður um deildirnar í Hósvík og Kvívík.

Orsøkin er einføld: Um tú býrt í t.d. Hósvík, og er til arbeiðis í Havn frá tíðliga á morgni til kl. 17-18 seinnapartin, so hevur tú ikki møguleika at gera nýtslu av tænastu tilboðum í heimbygdin, sum oftani lata aftur kl. 16.00. Hartil hevur tað eisini ávirkan, at tilboðini í Havn eru fleiri og í ávísum førum eisini betri.

**Størri møguleikar**
Samfelagsgranskarin, Dennis Holm, hevur kannað hugtakið fjarferðar. Hann hevur serliga arbeitt við bygdunum rundan um Havnina. Dennis greiðir frá, at ein stórur partur av arbeiðsstyrkini í bygdunum á Streymoynni arbeiða uttanfyri heimbygdina og ferðast dagliga til Havnar.

Í Havn er tænastu útboðið væl størri enn á bygd og tí gera fjarferðar sær dælt av mongu tilboðunum í høvuðsstaðarøkinum. Tey keypa inn gerandisvørur í Havn, har útboðið er størri og prísurin oftani er betur, og gera nýtslu av øðrum tænastutilboðum í høvuðstaðnum.

Tá borgarar á bygd eru í miðstaðarøkinum stóran part av degnum, kunnu hesir borgarar bert í avmarkaðan mun gera nýtslu av teimum tænastum, sum heimbygdin hevur møguleika at veita teimum.

**Ikki óvæntað**
Dennis Holm hevur kannað viðurskifti viðvíkjandi fjarferðing í Kvívík og Hósvík í Norðstreymi. Úrslitið er greitt. Stórur partur av borgararunum í Kvívík og Hósvík fjarferðast til miðstaðarøkið hvønn morgun til arbeiðis. Tað kemur tí ikki óvart á hann, at júst deildirnar hjá Føroya Sparikassa í Kvívík og Hósvík verða niðurlagdar í næstum.

Hann greiðir frá, at kanningar vísa, at fjarferðar nýta tænasturnar í miðstaðarøkinum og tí hava teir ikki tørv á somu tænastum í heimbygdini. - Tá flestu borgararnir hava sína dagligu gongd í miðstaðarøkinum velja tey oftani í eini fríløtu ella á leiðini heim frá arbeiða at nýta tilboð har, og tí verða tænasturnar í heimbygdini ikki nýttar í eins stóran mun, sigur Dennis Holm. Men fyri eitt nú tey eldru, sum ikki hava góðan møguleika at gera nýtslu av tilboðum aðrastaðni, er tað ein stórur missur, at lokal tænastu tilboð verða niðurløgd. Tað er altíð keðiligt at stovnar verða niðurlagdir á bygd - og eisini symbolskt hevur tað stóran týdning fyri bygdafólkið, sigur hann

**Føroysk serstøða**
Dennis Holm sigur, at hann hevur arbeitt við hugtakinum fjarferðing ella pendling síðan 2001. Kanningarúrslitini eru bygd á samrøður og spurnarkanningar seinastu tvey árini. Fyribils úrslit frá kanninginum vórðu løgd fram á eini altjóða ráðstevnu í Wales í August 2003, og ætlanin er, at ritið um pendlarar skal gevast út í Føroyum um ein góðan mánað. Bygdirnar Hósvík og Kvívík hava verið sonevndar "casir".

Hann greiðir frá, at ikki er óvanligt, at fjarferðarar í londunum uttanfyri Føroyar hava trupulleikar við at gerast partur av lokalsamfelagnum, orsaka av at ein stórur partur av gerandisdegnum verður brúktur uttanfyri heimstaðin. Úrslitini av føroyska kanningini vísa kortini greitt, at hetta er ikki støðan í føroysku bygdunum.

Dennis sigur, at tað vísir seg, at føroyskir fjarferðar hinvegin gera nógv fyri at varðveita sosiala sambandið við heimbygdina, hóast teir eru burtur stóran part av degnum. Dennis Holm vísir millum annað á, at sosiala lívið í t.d. Hósvík ikki tykist verða merkt av, at ein stórur partur av fólkinum eru fjarferðarar. Heldur tvørturímóti tykist bygdalívið í Hósvík verða ríkt, og tað er hetta sum skapar trivnað.




